# Tað var ikki rætt at taka støðu



– So leingi løgfrøðingarnir eru so ósamdir, sum teir eru, vildi tað verið skeivt av Løgtinginum at broytt skipanina, tí hevði løgtingið í veruleikanum tikið eina støðu í einum málið, sum ikki er búgvið til støðutakan, heldur løgmaður

**– At skuldseta meg fyri at hava gjørt meg inn á Løgtingið, er at yvirmeta evnini hjá løgmanni og at undirmeta evnini hjá løgtinginum, heldur Jóannes Eidesgaard**

STÝRISSKIPANIN

*Áki Bertholdsen*
*áki@sosialurin.fo*

– Eg havi ikki gjørt meg inn á Føroya Løgting.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður er alt annað enn samdur við Edmund Joensen, løgtingsformann.

Á síðu fimm í blaðnum staðfestir Edmund Joensen, at løgmaður hevur gjørt seg inn á Føroya Løgting við at eggja Løgtinginum til at taka eina avgerð, sum er í stríð við sjálva stýrisskipanina.

– At siga, at eg havi so stóra ávirkan á Løgtingið, er bæði at yvirmeta evnini hjá løgmanni at ávirka Løgtingið og at undirmeta evnini hjá Løgtinginum at taka avgerðir, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Løgtingslimir eru undir ávirkan alla tíðina, alla møguliga staðni frá. Men ongin er yvir og ongin er undir liðini á Løgtinginum og Løgtingið er altíð ført fyri at taka tað røttu avgerðina.

### Eiga ikki at taka støðu í løtuni

Jóannes Eidesgaard ásannar, at ongin ivi er um, at tað er eina og aleina Løgtingið, sum hevur heimild til at innkrevja skatt.

Men tað stóra ivamálið er, um gjaldið til ALS og barnsburðargrunnin er skatt-ur ella ikki.

– Tað er stórt løgfrøðiligt ivamál um, antin talan er um skatt ella ikki. Løgfrøðin hjá Løgtinginum metir, at talan er um skatt. Hinvegin hava fleiri aðrir løgfrøðingar eisini mett um støðuna. Eitt nú varð eitt álit gjørt um ALS, har seks løgfrøðingar søgdu sína hugsan. Fýra av teimum mettu, at talan var ikki um ein skatt og tveir mettu, at talan var um skatt.

– Samstundis mugu vit ásanna, at skipanin, sum vit hava nú, er ein skipan, sum hevur verið galdandi í fleiri ár. Tað er ikki nýtt, at landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta gjaldið til ALS innanfyri ávísar karmar, tí tað hevur hann havt í fleiri ár.

– Mín áskoðan er, at so leingi óvissa er um spurningin, eiga vit at varðveita ta skipan, vit hava, sigur løgmaður.

– Skuldu vit gjørt eftir áheitanini frá formansskapinum, høvdu vit samstundis tikið støðu til, at inngjaldið til barnsburðargrunnin og til ALS er skattur og tað haldi eg ikki er rætt at politikarar gera, so leingi løgfrøðin er so ósamd, sum hon er.

– Løgfrøðiligi ivin er so mikið stórur, at eg haldi at tað vildi verið skeivt, at løgtingið tók eina støðu. Fyrrenn løgfrøðilig greiða er fingin á málinum haldi eg ikki, at málið er búgvi hjá politikarum at taka støðu til, heldur løgmaður.

Samstundis leggur hann dent á, at tað var ein samd vinnunevnd, sum mælti til at varðveita skipanina óbroytta.

Tí heldur Løgmaður framvegis, at tað var ein pragmatisk, ella skilagóð avgerð, at varðveita skipanina, sum hon er.

### Óvissan er óheppin

Samstundis ásannar løgmaður, at tað er óheppið, at óvissa skal vera um, antin talan er um skatt ella ikki.

– Men í hesum sambandi kundu vit kanska fýlst á, at stýrisskipanin ikki útgreinar, hvat skattahugtakið fevnir um.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað er natúrligt, at hesin spurninur verður tikin upp í sambandi við stjórnarskipanararbeiðið, sum er ígongd.

– Eg vænti at ein partur av tí arbeiðnum, verður eisini at mæla til onkrar broytingar í stýrisskipanini. Og skulu vit endurskoða stýrisskipanina, hevði tað verið hent um vit samstundis fingu eina allýsing av hugtakinum skattur og eina nágreining av, hvat skattur er, sigur løgmaður.

### Fekk bláa stemplið

At Edmund Joensen eisini finst at framferðini í sambandi við Íslandssáttmálan, skilir løgmaður onki av.

– So má løgtingsformaðurin hava ein trupulleika við síni egnu umsiting, tí onki mál kann verða lagt fyri løgtingið, fyrrenn løgfrøðingarnir í umsitingini hjá løgtinginum hava góðkent tað.

– Tað gjørdi løgtingsskrivstovan eisini í sambandi við Íslandssáttmálan.

Annars vísir løgmaður á, at tað er ikki óvanligt, at brúka tað mannagongdina, sum landstýrið brúkti. Sama mannagongd varð eisini brúkt, tá ið mannarættindasáttmálin varð settur í gildi, sigur løgmaður.

Sí eisini síðu 5.

## Grundleggjandi ósemja um grundleggjandi spurning

**– Grundleggjandi ósemja er ímillum Løgtingið og Landsstýrið um inngjøldini til Barnsburðargrunnin og ALS, skattur ella ikki**

Eru inngjøldini til ALS og Barnsburðargrunnin skattur ella ikki.

Tað er ein grundleggjandi spurningur, sum løgting og landsstýrið eru grundleggjandi ósamd um.

Í Stýrisskipanini stendur, at tað er bara Løgtingið, sum hevur heimild til at krevja inn skatt.

Men nú løgtingið akkurát hevur samtykt lógina um Barnsburðargrunn, hevur tað givið landsstýrismanninum í vinnumálum heimild til at áseta inngjaldið til grunnin.

Og stóri stríðsspurningurin er nú, um hetta er brot á stýrisskipanina ella ikki.

Tá ið Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, legði uppskotið um barnsburðargrunnin fyri Løgtingið, staðfesti hann at inngjaldið til grunnin hevur eyðkenni av at vera ein skattur.

Ì viðmerkingunum til uppskotið, staðfestir hann, at eingin neyv allýsing er av innihaldinum í skattahugtakinum í stýrisskipanarlógini, men vanliga verður hildið, at tað fevnir um lógarkravd gjøld til tað almenna, og sum ikki kunnu fatast sum viðurlag fyri eina ávísa mótveiting frá tí almenna.

– Barsilsgjaldið er kravt (tvungið) og fer í landskassan. Einki ávíst samband er ímillum tað, ið verður rindað til skipanina, barsilsgjaldið, og tað, ið fæst úr skipanini, barsilspeningurin.

– Barsilsgjaldið hevur eyðkenni av skatti, og tað kann tí vera ivi um, hvørt tað er í samsvari við stýrisskipanarlógina, at landsstýrismaðurin kann broyta inngjaldsprosentið, segði Bjarni Djurholm.

Tí mælti hann sjálvur til, at hann hann misti heimildina at áseta inngjaldið.

Men ein samd vinnunevnd hjá Løgtinginum var eini heilt aðrari áskoðan.

Í sínum viðmerkingum til uppskotið, vísir vinnunevndin á, síðani 1997 hevur stýrið fyri ALS havt heimild til at broyta inngjaldsprosentið til ALS innan fyri eitt ávíst mark. – Hendan skipan hevur virkað væl, og tí sær nevndin onga orsøk til, at Løgtingið broytir kós í spurninginum um at geva øðrum enn Løgtinginum heimild til at áseta inngjaldið til barsilsskipanina ella arbeiðsloysisskipanina.

Ein samd vinnunevnd mælir tí løgtinginum til at broyta uppskotið soleiðis, at landsstýrismanninum skal hava heimild til at broyta inngjaldið til barnsburðargrunnin innanfyri eitt mark, sum Løgtingið ásetir. Tað vil siga, at inngjaldið kann ikki verða hægri enn 0,62% av lønini.

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.

Ring og fá eitt tilboð



Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo